# Skeiv adressa, Jóna

**HEÐIN MORTENSEN**
borgastjóri



Síggi í bløðunum, at sambandskvinnan Jóna Mortensen hevur grein við yvirskriftini »Grát mítt elskaða land«, har hon hugleiðir um ymisk sosial viðurskifti, so sum almannastovu, pensjón, apotek, sjúk børn, gomul fólk og annað, ið sanniliga eisini eru viðkomandi viðurskifti í hesum døgum.

Hóast hetta, at síggja til, eru leysar hugleiðingar, eru tær í veruleikanum ein lemjandi atfinning at landsstýriskvinnu Sambandsfloksins í almannamálum, Rósu Samuelsen, tí hon er helst tann, ið best kann svara fyri tað nógva, ið nevnt verður í greinini.

Júst tí tykist tað eisini sera løgið, at Jóna Mortensen hevur gloymt at sett adressu á ella ikki vil gera tað, tí her verða bara nakrir bóltar tveittir upp í loft, hóast hon í eini handavend kundi avgreitt tað mesta av hesum innanhýsis í Sambandsflokkinum.

Hetta er heilt margháttligt og fær helst fólk at undrast, um sambandsfólk framvegis ikki tosa sama mál ella kanska slett ikki tosa saman. Jóna Mortensen er enntá forkvinna í valfelag floksins í Suðurstreymoy, so hon mátti lættliga fingið »audiens« á rætta stað, vildi hon veruliga fingið svarað sínum spurningum.

Men tað mest merkisverda við greinini, ið annars er útmerkað, er tann beinleiðis skeiva adressan, ið verður smoygt inn ímillum í endanum, har undirritaði brádliga verður navngivin og drigin upp í hesa sugguna, ið sambandsfólk eiga við høvd og gørnum. Tann, ið ikki veit betur, kann tí lættliga lesa alt hetta, sum skuldi undirritaði havt skyldina av vánaligu stýringini hjá Sambandsflokkinum á hesum øki.

So er av øllum góðum grundum ikki, tí tvørturímóti hava vit í Tórshavnar kommunu sitið leingi og bíðað eftir játtan frá júst Rósu Samuelsen, so vit kunnu sleppa í gongd við at loysa okkara part av trupulleikunum hjá teimum røktarkrevjandi, men har hendir bara einki. Vit hava sanniliga arbeitt skjótt og hava leingi verið til reiðar at farið í gongd, men sleppa bara ikki, fyrr enn Rósa Samuelsen eisini avgreiðir sín part.

Hesum kundi Jóna Mortensen lættliga funnið útav, um hon bara setti seg í samband við sína partakvinnu í almannaráðharrasessinum, heldur enn at brúka undirritaða sum bíligt offur í síni endamálsleysu mjørkaboksing.

Av tí sama vil undirritaði eisini greitt frábiðja sær at verða settur til svars fyri allan tann hurlivasa, sum í løtuni valdar í løgtingi og landsstýri, tá tað kemur til almannamálini!

# Viðmerkingar til grein í Dimmalætting, hósdagin 24. september 2009, um CTD kanningar

**AKSEL V. JOHANNESEN**
landsstýrismaður í heilsumálum



Fyrst og fremst vil eg nýta høvið at takka Hans Atla Dahl, stjóra á privatu kanningarstovuni Amplexa Genetics, fyri tað góða samstarvið, ið eg veit hevur verið millum Amplexa og føroyska heilsuverkið. Mítt ørindi við hesi viðmerking er tó at rætta nakrar misskiljingar og skeivar pástandir, sum koma fram í greinini úr Dimmu »Nógv fleiri berarar enn fyrst hildið«, sum byggir á samrøðu við Hans Atla Dahl.

Í greinini sigur Hans Atli Dahl, at Heilsumálaráðið hevur valt bert at genkanna tey, sum eru beinleiðis í familju við onkran sjúkan og so annars at kanna sonevndu PKU-kortini frá 1986 og fram. Ein loysn sum sambært Hans Atla Dahl er óbrúkilig og kostnaðarmikil.

Hetta er ikki rætt. Høvuðsætlanin er fyrst og fremst at bjóða øllum føroyingum eitt tilboð um kanning. Tey, ið ikki hava sjúkueyðkenni ella eru skyldfólk við ein sjúkan, fara at gjalda 100 kr. fyri kanningarnar. Harafturat er ætlanin at kanna PKU-kortini hjá Statens Serum Institut.

Harumframt metir Hans Atli Dahl, at loysnin hjá landsstýrismanninum er kostnaðarmikil og nevnir hann, at »hetta er ein skrúva uttan enda«. Hans Atli verður víðari siteraður: »Fyrst eina millión krónur til Statens Serum Institut til ónýtiligar PKU kanningar, so 2,5 mió. kr. í 2010 og so 1,3 mió kr. í fleiri ár framyvir til kliniskar genetiskar kanningar«.

Hinvegin kann Amplexa, sambært Hans Atla Dahl, gera hetta nógv bíligari: »Amplexa hevur bjóðað seg til at gera arbeiðið fyri Heilsumálaráðið fyri 2,7 mió. kr. fyri screeningina og við innsavning og uppfylging fyri 3,5 mió. kr.«

**Villleiðandi roknistykki**
Trupulleikin við hesum roknistykki er, at tað er sera villleiðandi. Kanningarnar av PKU-kortunum hjá Statens Serum Institut koma at kosta heilsuverkinum umleið eina mió. kr. Harumframt koma tær ókeypis kanningarnar av teimum, ið hava sjúkueyðkenni ella eru skyldfólk við ein sjúkan. Hesar kosta umleið hálva mió. kr. Sagt við øðrum orðum verða tær samlaðu útreiðslurnar fyri kanningarnar sostatt umleið 1,5 mió. kr. Kanningarnar, ið Amplexa mælir til, kosta umleið 3,5 mió. kr. ella umleið 2 mió. kr. meira enn tær, landsstýrismaðurin eftir fakligari tilráðing ætlar at seta í verk.

Umframt hetta, so er sjálv fortreytin fyri roknistykkinum hjá Hans Atla Dahl skeiv. Tað ber ikki til at fáa PKU-kortini ókeypis, tí tað krevur eitt størri arbeiði at finna fram tey røttu. Haraftrat er ein løgfrøðiligur knútur í at loyva einum privatum vinnulívsmanni fría atgongd til okkara ílegur. Hátturin, sum vit hava valt kann forsvarast løgfrøðiliga, hóast hann er á markinum, tí yvirskipaða endamálið er at bjarga lívum. At finna berarar er ikki ein nóg góð løgfrøðilig grundgeving fyri at kanna ílegur hjá fleiri túsund fólkum.

Hinar útreiðslurnar, ið Hans Atli Dahl sigur skulu nýtast til kanningar, verða harafturímóti oyramerktar til eina sceeningseind og eina klinisk genetiska ráðgeving, sum skulu stovnsetast óansæð hvør kanningarloysn verður vald. Tað kann vera, at Hans Atli Dahl ikki er kunnaður við hesi viðurskifti, men í øllum førum verður hetta als ikki nevnt í greinini. Soleiðis er loysnin hjá landsstýrismanninum munandi bíligari enn tann hjá Amplexa Genetics.

**Ónýtiligar kanningar? Tvørturímóti!**
Hans Atli Dahl hevur eisini hug at sáa iva um dygdina av teimum kanningum, ið heilsuverkið ætlar at seta í verk. At hesar skulu vera púrt ónýtiligar, kann undra, tá landsstýrismaðurin hevur valt at fylt teimum fakligu tilmælum, ið eru latin Heilsumálaráðnum frá ávikavist danska heilsustýrinum og Ulriku Steuerwald, barnalækna.

Í greinini verður víst á, at fyritøkan hjá Hans Atla Dahl hevur kannað og funnið tveir tilburðir av børnum, sum hann metir áttu at verið funnin við PKU carnitin mátingunum hjá Statens Serum. Heilsumálaráðið hevur kannað hesar álvarligu upplýsingar við Barnadeildina á Landssjúkrahúsinum. Haðani er váttað, at tey hava skrásett tvey sjúk børn, fødd 2005, men hesi børnini als ikki eru kannaði hjá Statens Serum Institut. Orsøkin til tess er, at PKU-kanningin hevur verið sjálvboðin, og í júst hesum førunum eru blóðroyndin altso ongantíð send Serum Instituttinum til kanningar.

Harumframt hevur Landssjúkrahúsinum upplýst, at bert ein vaksin sjúklingur varð funnin í summar við beinleiðis genkanning, men, verður sagt frá Landssjúkrahúsinum, hesin persónurin hevði uttan iva eisini hevði verið funnin við at kanna carnitininnihaldið í blóðinum.

**Ymsar variasjónir**
Spurnartekin verður eisini sett við heilsufakliga tilmælið um, at blóðkanningin er tann tryggara loysnin, tí alt bendir á, at fleiri mutasjónir av CTD-sjúkuni finnast í Føroyum og ein genkanning finnur ikki hesar mutasjónir av sjúkuni. Heilsufakliga metingin er, at tann sonevnda »sandoyarvariasjónin« gaman í er tann mest vanliga, men ein grundaður illgruni er um, at tvær aðrar eru í Føroyum, og serliga er ivi um hvussu útbreidd onnur av teimum er. Hans Atli viðurkennir, at hann ikki hevur nóg nógvar upplýsingar til at siga nakað fyri vist, men at hann metir at hon er komin seint til Føroyar og tí er meiri sjáldsom enn »sandoyarmutasjónin«.

Viðvíkjandi hesi ókendu mutasjónini, havi eg frá míni læknafakligu ráðgeving fingið upplýst, at tað ber ikki til at siga, hvussu óvanlig hon er, fyrr enn øll CTD-sjúk eru funnin. Sandoyarmutasjónin tykist vera nógv tann vanligasta, men hinvegin er eisini kannað nógv mest fyri CTD millum sandoyingar og eitt heilt annað mynstur kann fara at vísa seg aðrastaðni í landinum.

Út frá heilsufakligu tilmælunum er eingin ivi um, at við núverandi kunnleika til mutatiónsmynstrið er tað rættast at screena fyri carnitininnihaldi í blóðinum heldur enn genetiskt. Tá allar mutatiónir einaferð eru identificeraðar, kann genetiska kanningin útbyggjast og verður genkanningin tá ein sera tryggur máti at kanna fyri CTD.

**Fulla undirtøku frá heilsumyndugleikunum**
At enda má eg nevna, at loysnin sum ætlanin er at seta í verk hevur millum annað verið viðgjørd á fundi í danska heilsustýrinum tann 28. august 2009, har umboð fyri Heilsustýrið, Kliniskgenetisku deildini á Ríkissjúkrahúsinum, Landssjúkrahúsið, Statens Serum Institut, Heilsumálaráðið, umframt Ulrike Steuerwald, barnalækni vóru til staðar. Á fundinum var full undirtøka fyri, at rætti framferðarhátturin var at bjóða eina sokallaða biokemiska kanning fyri allar føroyingar og ikki eina kostnaðarmikla genkanning, sum millum annað Amplexa Gentics bjóðar fram.

Eg havi fult álit á tí dygdargóðu objektivu heilsufakligu ráðgevingini, sum eg hevur fingið í hesum máli og eg havi ongar ætlanir at ganga ímóti tilmælunum, hóast aðrir aktørar hava ivalyst eisini hava skilagóð sjónarmið hesum viðvíkjandi.

# Viðmerking til Heina í Skorini

**GERHARD LOGNBERG**
løgtingsmaður



Eg má siga, at eg bleiv sera kløkkur, tá Heini í Skorðini, journalistur á Sosialinum, hevði funnið eina so harðenda yvirskrift, sum siterer meg fyri at kalla løgmann »Føroya stórsta svíkjara«.

Hetta prógvar fyri mær, at man illa kann taka telefonina, tá ólukku journalistarnir ringja.

Heini tú ringdi meg upp, eg var staddur í Høvdarhaga. Sum eg segði við teg, so hoyrdi eg næstan einki av tí tú segði.

Eg harmist um, at tú kundi missbrúka hesa støðu so álvarsliga.

Tað, sum eg segði var, at løgmaður á samgongufundi legði fyri við hesum orðum; at Sandoyartunnilin var ikki við, tí tað var ikki ráð til hann. Har hevur samgongan svikið so dyggiliga.

Hvussu orðini fullu minnist eg ikki, men veitst tú nú hvat ella álvara tos, ein plakat av mær við hasum orðunum sum yvirskrift?! Har missbrúkti tú títt vald sum journalistur, og tað harmar meg. Men tað kann eg so einki gera við.

Men hvussu harmur og skuffaður eg var og eri um mína samgongu, klári eg hvørki at siga við orðum tíðans heldur festa á blað.

Men tað eru nógv í løgtinginum, sum eg havi stórt álit á og havi eg trúgv til, at samgongan heldur orð og tekur tunnilin við á fíggjarlóguna, sum staðfest er í samgonguskjalinum og seta tað til síðis sum ikki er.

Men eg komi at sita og eygleiða hvat fer at henda og hvat verður endaliga samtykt seinnapartin av desember mánaði, tá 3. viðgerð av fíggjarlógini er liðug.

## Gerhard eigur hvørt orð

Í viðmerking í dag leggur Gerhard Lognberg eftir undirritaða fyri at hava "misbrúkt mítt vald sum journalistur", tá eg í Sosialinum um vikuskiftið endurgevi Gerhard fyri at siga, at "løgmaður er Føroya størsti svíkjari".

Vil við hesum bert undirstrika, at orðini hjá Gerhardi fullu presis soleiðis, sum hann er endurgivin, tá eg hósdagin ringdi til hann og spurdi um Sandoyartunnilin, sum er strikaður í ársins fíggjarlógaruppskoti. Gerhard verjir seg við, at hann var staddur burturi í haga, og at sambandið var vánaligt. Men tað er hamrandi líkamikið og broytir einki uppá, at Gerhard segði tað, sum hann segði.

Kanska man aftur skal fara at banda samrøðurnar, tá sintir politikarar angra síni orð.

**Heini í Skorini, blaðmaður**